MS-061/2024

# Munnligur fyrispurningur
eftir § 52 í Tingskipanini

**Spyrjari:** Beinir Johannesen, løgtingsmaður

**Svarari:** Margit Stórá, landsstýriskvinna í umhvørvismálum

**Evni:** Barsil hjá sjálvstøðugum vinnurekandi

**Spurningar:**

1. Hvussu nógv sjálvstøðug vinnurekandi hava teknað sær eina trygging í barsilsskipanini?
2. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at endurskoða skipanina fyri útgjald hjá sjálvstøðugum vinnurekandi úr barsilsskipanini?
3. Metir landsstýriskvinnan, at barsilsskipanin er nøktandi fyri sjálvstøðug vinnurekandi í verandi líki?

**Viðmerkingar:**
Í longri tíð hevur politiska skipanin raðfest barsilsskipanina, og breið semja er um, at møguleikarnir skulu vera so góðir sum møguligt hjá foreldrum ta fyrstu tíðina, tey hava saman við barninum.

Fyri at taka nøkur dømir, so er avgerð tikin um at leingja barsilsfarloyvið til 52 vikur, hækka hámarksútgjaldið og betra um umstøðurnar hjá tvíburðaforeldrum o.ø. Hetta eru alt góðar broytingar, men tó eru korini hjá sjálvstøðugum vinnurekandi ikki broytt.

Sjálvstøðug vinnurekandi hava møguleika at tekna sær eina trygging, ið gevur teimum møguleikan at fáa útgjald úr barsilsskipanini, um tørvur er á tí. Tó vísir tað seg, at sum skipanin er sett saman fyri teirra viðkomandi, so eru tað fleiri, ið ikki fáa nakað serligt burturúr. Eisini skal tryggingin hava verið í gildi í samanhangandi eitt ár, áðrenn barsilsfarloyvið kann byrja. M.a. hesi viðurskiftir gera, at fleiri velja ikki at tekna tryggingina, tí mett verður, at tað ikki fæst nóg nógv gagn burtur úr henni.

Tryggingin kostar fyri tann sjálvstøðuga vinnurekandi, og tí má tað eisini geva meining at tekna hana.

Fyri at fáa greiðu á, um ætlanir eru at endurskoða barsilsskipanina á hesum øki verður hesin fyrispurningur settur.

**Á Løgtingi, 19.mars 2025**

Beinir Johannesen